Løgmansskrivstovan
Lógartænastan

7. januar 2022

## Hoyringarsvar frá Etiska ráðnum til uppskot til broyting í revsilógini kap. 24 um kynslig brotsverk

Etiska ráðið hevur á fundi viðgjørt broytingarnar í revsilógini kap. 24, sum nú eru til hoyringar.

Etiska ráðið fegnast um, at rættartrygdin og rættvísiskenslan við ætlaðu broytingunum verður styrkt, og at sjálvsavgerðarrætturin hjá tí, sum er fyri kynsligum ágangi, ikki eigur at vera eitt ivamál.

Etiska ráðið fegnast eisini um, at tað við ásetingini um samtykki nú helst verður léttari hjá teimum, sum eru fyri kynsligum ágangi at lyfta próvbyrðuna, ikki minst hjá teimum, sum ikki sjálvi eru før fyri at mótmæla ógerðina.

Etiska ráðið metir eisini, at broytingarnar kunnu koma at hava eina fyribyrgjandi ávirkan, sum verður øllum at gagni.

Etiska ráðið vil samstundis leggja dent á, at tað er ein etisk skylda at tryggja og verja rættartrygdina hjá báðum pørtum, sama hvør broyting verður gjørd í revsilógini, og at tignin hjá hvørjum einstakum framvegis eigur at verða vird og havd í huga, tá broytingar verða gjørdar.

Vinaliga vegna Etiska ráðið

Anne Mette Greve Klemensen, forkvinna

Etiska ráðið, J.H. Schrøters gøta 7 • T-postur: er@er.fo • Tlf: 00 298 219484 • www.etiskaradid.fo